## Danir í iva um evruna

Danir hava ilt við at taka støðu til, um teir skulu fáa sær evruna til gjaldoyra, ella um teir skulu varðveita krónuna. Í einari spurnarkanning, sum Danske Bank hevur latið gera, svara 38,4 prosent, at tey høvdu heilt vist atkvøtt fyri evruni, um spurningurin kom til fólkaatkvøðu nú. Samstundis siga 37,8 prosent, at tey høvdu heilt vist sagt nei. 10,5 prosent siga seg vera í iva, men at tey helst høvdu sagt ja, og 9,9 prosent onnur ivandi siga, at tey høvdu helst sagt nei. Samanumtikið eru tað sostatt fleiri, sum vilja hava evruna. Men munurin er bara 1,3 prosentstig, sigur Danske Bank.



## Radion skal út

Radon er eitt slag av gassi, sum er nógvastaðni í náttúruni. Tað hevur eitt sindur av geislavirkni í sær, men er talan um nóg stórar nøgdir, kann evnið elva til krabbamein. Nú vil heimsheilsustovnurin WHO hava øll lond at taka eitt tak ímóti evninum. Sagt verður, at radion lekur inn í hús og íbúðir ígjøgnum rivur og smá hol í gólvi, veggjum og rørum, og kanningar í Evropa, USA og Kina vísa, at geislavirkið gass heima við hús er ein nógv størri heilsuvandi enn higartil hildið. WHO hevur tí skotið upp, at hámarkið fyri, hvussu nógv radion kann vera í húsum ella íbúðum, verður lækkað heili 90 prosent.

# Hava ikki ráð til mjólk



**Uttan fráboðan varð stuðulin til at anda sjúka soninum skerdur og einki greitt svar er at fáa hví. Í tríggjar mánaðir eru Rani og Fríðgerð í Líð tveitt aftur og fram millum málsviðgerðar í Almannastovuni, meðan trotið á kontoini bara er vaksið.**

BUREAUKRATI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tað er ongantíð lætt at hava eitt sjúkt barn. Tað er sum ein skriða loypir og skrykkir grundarlagið undan familjuni. Men Rani og Fríðgerð í Líð, sum eru ávikavist portørur og lærarinna, kláraðu at fáa dagligdagin at hanga saman, og batar vóru at hóma, hóast tey hava eitt sjúkt barn. Ein lógarbroyting í juli mánaði fær tó skirvisliga korthúsið at rapa. Tey seta seg í samband við Almannastovuna, og har byrjar ein mánaðarlang leitan eftir hjálp og eftir einum svari. Ein leitan, sum enn ikki er liðug.

### Fyrsta skriðan loypir

Tað byrjar alt sum í einum dreymi, og Fríðgerð og Rani í Líð sveima sum á ljósareyðum skíggjum. Vit eru í desember mánaði og Fríðgerð hevur júst átt sonin Lýðar. Hetta er næsta barn teirra. Skjótt finna tey tó útav, at alt er ikki sum tað skal vera. Lýðar tekur ikki uppá, sum hann skal.

Hann líðir av eini sjúku, sum kallast Reflux. Hetta merkir at lukkimuskulin niður í magan er ov veikur, og at magasýra rennur upp aftur alla tíðina. Hetta ger at hann má hava eina sondu beinleiðis í magan, og fær flótandi mat førdan inn við pumpu. Hetta tekur fleiri tímar dagliga. Men aðrir trupulleikar stinga seg eisini upp og Lýðar hevur ilt við at trívast.

Fyri familjuna merkir hetta, at Lýðar ikki kann verða í dagrøkt ella í barnagarði, og at tey tí mugu vera heima hjá honum og vera um hann døgnið runt. Í Føroyum er heldur eingin stovnur uttan Landssjúkrahúsið, ið hevur førleikar til at taka sær av honum, men Landssjúkrahúsið er eingin dagstovnur.

### Batar í eygsjón

Stutt frammanundan eru tey komin uppundan við døttrini Lív, sum eisini hevði líknandi trupulleikar. Hon er nú er vorðin somikið frísk, at hon kann eta vanligt og ganga á dagstovni.

Tá var Fríðgerð heima við henni, og Rani arbeiddi so nógv sum til bar, til tess at fáa fíggjarliga partin at hanga saman. At hava eitt sjúkt barn er strævið, og hugsingur var ikki um, at Fríðgerð skuldi vera einsamøll um enn eitt sjúkt barn.

Tí taka tey, í samráð við læknarnar, í januar mánaði avgerð um, at Rani eisini skal vera heima. Tá vita tey ikki hvussu leingi tað kann vara, inntil Lýðar aftur kann eta sum vanligt, og sleppur av við sonduna. Tey vóna at hann verður skjótt frískur, men tað kann eisini vara meira enn eitt ár.

Fríðgerð er í barnsburðarfarloyvi, og Rani kann vera heima við fullum endurgjaldi fyri inntøkumiss vegna sjúkt barn. Ætlanin er so at Fríðgerð skal aftur til arbeiðis upp á hálva tíð eftir at farloyvið er av.

Tey fáa tá játtað, at Rani kann vera heima og fær fult endurgjald. Spakuliga gongur framá, Lýðar betrast sum hann skal, fíggjarliga hanga tingini akkurát saman og batar eru at hóma.

### Seinna skriðan loypir

Men brádliga loypir tann næsta skriðan. 1. juli verður ein lógarbroyting framd. Løgtingið samtykkir at seta eitt hámark fyri, hvussu stórt endurgjaldið fyri mista arbeiðsinntøku kann vera. Broytingin hevur við sær, at endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku ikki verður veitt fyri tann partin av bruttuinntøkuni, ið er omanfyri 25.000 krónur um mánaðin, íroknað frítíðarløn.

Hetta fær Rani at vita í einum skrivi frá Almannastovuni. Rani arbeiðir vanliga sum portørur á Landssjúkrahúsinum, og gjøgnum seinasta árið hevur hann havt eina ársinntøku sum svarar til líka undir hesa upphædd um mánaðin. Tí heldur hann ikki ikki, at tey verða rakt av broytingini, og niðast í skrivinum stendur, at tá kunngerðin er lýst, verður teirra mál tikið upp til viðgerðar, og fer Almannastovan síðani at venda sær aftur til teirra fyri nágreiniliga at kunna tey um møguligar broytingar.

- Men tá eg so hyggi inn á heimagreiðsluna, síggi eg at endurgjaldið er skorið við næstan 2000 krónum um mánaðin, og eg havi einki fingið at vita frá Almannastovuni, sigur Rani.

Við teirri upphæddini, sum tá er eftir, melur tað ikki runt fíggjarliga. Skuld hava tey nógva, og stórt inngjald á heildarkontuna hvønn mánað. Tá so øll gjøld eru farin av, hava tey um 2700 krónur eftir at liva fyri um mánaðin.

### Kastibløka millum skriviborð

Rani setur seg beinanvegin í samband við Almannastovuni. Hann vil hava eitt svar uppá hví henda skerjing er farin fram, tí eftir tí sum varð teimum kunngjørt, áttu tey ikki at verið rakt av lógarbroytingini.

Men hjá Almannastovuni er einki greitt svar at fáa. Í ein heilan mánað tosar hann við málsviðgeran hjá sær, uttan at fáa nakað greitt svar og uttan at fáa hjálp. Nú fellir enn eitt útgjald, og enn einaferð hava tey bara 2700 krónur at liva fyri um mánaðin, og skulu tey hava mat á borðið allan mánaðin, má kontoin setast í trot.

Ein málsviðgeri fer í feriu, og Rani endar hjá tí næsta málsviðgeranum. Men einki greitt svar er at fáa. Nógv ymisk og ógreið svør verða latin honum, uttan at støðan tó broytist nakað. Henda støðan heldur fram og hann verður tveittur á alsamt fleiri ymisk borð, tí tann málsviðgerin ikki kann gera meira.

### Ikki longur ráð til mat

Í dag stendur Rani við tað fimta skriviborðið, og aftur hjá upprunaligamálsviðgerðanum. Enn hevur hann einki greitt svar fingið, og triðja útgjaldið stendur fyri framman, har tey bara fáa 2700 krónur at liva fyri um mánaðin.

- Nú eru vit komin hartil, at eg ikki longur havi ráð at keypa ein pakka av mjólk ella at fáa mat á borið til børnini, staðfestir Rani.

Sjúkrahúsið er tað, sum krevur at drongurin má vera heima og vera ansaður. Tað verður ein sammeting millum foreldrini og læknan, nær hann er førur fyri at fara í røkt. Tey verða tí noydd at vera heima um hann, og fáa endurgoldið lønarmissin.

- Eg kann ikki bara fara til arbeiðis aftur, tí eingin er at ansa Lýðar og taka sær av honum. Tað tekur fleiri tímar dagliga bara at geva honum eta, og tað er við eini serligari pumpu, sum pumpar matin inn gjøgnum sonduna, greiðir Rani frá.

### Lang viðgerðartíð

Tá komið er út í juli mánað, verður avgerð tikin um, at Fríðgerð, móti ráðunum hjá læknunum, skal fara aftur til arbeiðis. Hon er lærari, og henni stendur í boði at fáa starv í einum skúla. Strævna tíðin við sjúkum barni hevur tó gjørt, at hon undir ongum umstøðum hevur orku til at arbeiða fulla tíð beinanvegin. Tí verður avrátt við læknan, at hon kann fara til arbeiðis upp á hálva tíð, og fær at vita, at hon kann fáa hina helvtina endurgoldna frá Almannastovuni vegna sjúkt barn.

Læknaváttanin verður send 20. juli, og hon fer til arbeiðis tá skúlarnir byrja, í vónini um at alt er í lagi. Eina góðan mánað eftir at læknaváttanin er send, hevur hon einki hoyrt aftur og ringir at rykkja eftir einum svari. Men tá fær hon at vita, at har manglar eitt umsóknarblað. Málsviðgerðin kann tó taka á teirra kappa, at tey áttu at havt ringt til Fríðgerð og sagt, at hon skuldi fylla eitt umsóknarblað út saman við læknaváttanin, men at eingin hevði ringt.

Hetta er tó í góðari tíð